# Bæði krevja stig

*Sumba stríðist fyri lívinum í botninum, meðan B36 krevur ein sigur fyri at fylgja við oddinum*

JÁKUP MØRK

Tey árini Sumba hevur verið í fremstu fótbóltsrøðini, er tað meira enn so komið fyri, at B36 hevur vunnið trivaligan stórsigur á Krossinum.

Stendur tað til sumbingarnar, verður tað tó als ikki talan um stórtap sunnudagin, og helst hava teir okkurt at halda vónirnar í.

**Nógv positivt**

Sumba tapti annars 11-1 í fyrra dystinum millum liðini bæði, men bæði liðini hava verið fyri stórum broytingum síðani tá.

Heimaliðið hevur fingið fleiri leikarar aftur, sum vóru frá vegna skaða, og hóast úrtøkan hevur verið løk síðani summarsteðgin, so hevur spælið gingið munandi betri.

Undanfarna vikuskifti hildu teir toftamonnum í 80 minuttir, men máttu so at enda geva seg, men venjarin, Milan Cimburivic, heldur tó, at tað er nógv positivt frá hesum dysti, sum teir aftur kunnu gera nýtslu av.

Liðið verður í stóran mun óbroytt í mun til dystin móti B68. Bergur Vinther fekk triðja gula kortið, og hevur ti leikbann, men hinvegin er Mortan úr Hørg aftur klárur, so væntandi kemur hann beint inn á plássið hjá Bergi. Eirikur Joensen er framvegis ikki til reiðar at spæla.

Dánjal Johan Joensen hevur verið heima í summarfrí, og seiansta uppgáva hansara á hesum sinni, verður dysturin móti B36.

**Jákup burtur**

Hjá gestunum man størsti missurin undan dystinum vera, at Jákup á Borg ikki er tøkur til dystin. Hann fer sunnudagin til Danmarkar í útbúgvingarørindum, men verður væntandi tøkur aftur komandi dyst. Heldur ikki Carl H. Høgnesen er tøkur til dystin, men hinvegin er Mikkjal Thomassen aftur til reiðar at spæla, eftir at hann hevur sitið tveir dystir við leikbanni av sær.

At Mikkjal nú er tøkur aftur, gevr venjaranum størri møguleikar í bæði verju- og miðvallarpartinum, og so er spurningurin, hvussu Pelle Andersson velur at blanda kortini.

Spælið hjá B36 hevur gingið alt annað ann væl seinastu dystirnar, men móti FS Vágum fingu teir ein tiltrongdan sigur.

Skulu teir gera sær vón um europeiska luttøku komandi ár, er ein sigur eisini kravið í Sumba, men hetta verða havnarmenninir helst ikki einsamallir um at avgera.

## Dystirnir Hetta vikuskiftið

**1. deild menn, 13. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 20.08 | HB-FS Vágar | Petur Hansen |
| 20.08 | B71-B68 | Tummas Pauli Olsen |
| 20.08 | Sumba-B36 | Lassin Isaksen |
| 20.08 | KÍ-GÍ | Sune Johansen |
| 20.08 | NSÍ-VB | Niklas á Líðarenda |

**2. deild menn, 12. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 19.08 | TB-B36 | Jens Petur Brattalíð |
| 19.08 | GÍ-ÍF | Hans Falkvard |
| 19.08 | KÍ-NSÍ | Regin Egholm |
| 19.08 | LÍF-Royn | Jón Kári Frederiksen |
| 19.08 | HB-EB/Str. | Tommy O. Joensen |

**3. deild menn, 13. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 20.08 | AB-FS Vágar | Pætur Clementsen |
| 20.08 | B71-B68 | Jógvan Næs |
| 20.08 | TB-B36 | Zoran Mancic |
| 20.08 | KÍ-ÍF | Rúni Gaardbo |
| 20.08 | Skála-VB | Sunleif Álaberg |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 20.08 | HB-VB | Johan Krogh |

*Støðan undan vikuskiftinum, 1. deild menn*

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 12 | 8 | 3 | 1 | 25 | 14 | 11 | 27 |
| 2 | HB | 12 | 8 | 2 | 2 | 25 | 16 | 9 | 26 |
| 3 | B68 | 12 | 8 | 0 | 4 | 29 | 20 | 9 | 24 |
| 4 | B36 | 12 | 7 | 0 | 5 | 34 | 17 | 17 | 21 |
| 5 | NSÍ | 12 | 5 | 3 | 4 | 28 | 21 | 7 | 18 |
| 6 | KÍ | 12 | 5 | 2 | 5 | 27 | 12 | 15 | 17 |
| 7 | GÍ | 12 | 5 | 2 | 5 | 25 | 24 | 1 | 17 |
| 8 | B71 | 12 | 2 | 2 | 8 | 13 | 22 | -9 | 8 |
| 9 | FS Vágar | 12 | 2 | 2 | 8 | 14 | 31 | -17 | 8 |
| 10 | Sumba | 12 | 2 | 0 | -10 | 9 | 52 | -43 | 6 |

# FM á 1/2 marathon teini

*Aftur í ár verður skipað fyri FM kapping í 1/2 marathon*

Ein afturvendandi rennikapping seinastu árini hevur verið hálvmarathon í Havn.

Leygardagin 19. august fer Bragdið at skipa fyri hesari kappingini, ið er 21,1 km til longdar.

**Teinurin**

Byrjað og endað verður við Bursatanga, og byrjað verður kl. 13.00. Runnið verður niðan i býin runt um Telefonverkið og Sparikassan oman aftur til Bursatagna, og síðani
yvir við Strond har vent verður við tyrlupallin, og heimaftur til Bursatanga. Teinurin skal rennast 4 ferðir.

Skal fylgjast við í rennikappingini, er ivaleyst best at vera staddur á leið við Bursatanga, tá hetta er so at siga miðdepilin í renningini.

**Somu favorittar**

Í fjør vann Guttorm Sørensen úr Treystinum kappingina hjá monnum, meðan Rigmor N. Joensen vann kappingina hjá kvinnum. Tey bæði eru framvegis millum sterkastu rennarnar í landinum, og einki er at ivast í, at tey teljast millum favorittarnar leygardagin.

Umframt at vera FM á hesum teini, er kappingin eisini liður í sonevndu Daewoo Marathon kappingini, har rennararnir við at luttaka í nøkrum kappingum, renna heilt marathon til samans. Vinnarin verður so tann, sum hevur nýtt minst tíð til samlaða teinin.

Bragdið leggur dent á, at renningin er fyri øll sum eru 16 ár ella eldri. Tilmelding fer fram á staðnum hálvan tíma undan kappingini kl.12.30



*Rigmor N. Joensen er størsti favoritturin hjá kvinnunum*

# Súkkla 100 km

*Leygardagin verður kappast um FM á 100 km teininum. Størsti favoritturin er ikki við, so nýggjur vinnari skal finnast*

JÁKUP MØRK

Leygardagin fara føroysku súkklarnir at kappast um meistaraheitið í 100 kilometrum. Føroya sterkasti súkklari, Rógvi Johansen, boðaði fyrr í hesi vikuni frá, at hann ikki hevur møguleika at luttaka í kappingini, so tað verður undir øllum umstøðum talan um nýggjan føroyameistara í ár.

**Teinurin**

Kappingin byrjar kl. 10 leygarmorgunin, og byrjað verður í Skálabotni. Koyrt verður síðani til Funnings, upp um Eiðisskarð, áðrenn leiðin gongur til Havnar umvegis Signabøtunnilin.

Í Havn verður koyrt á teininum Eystari Ringvegur, Sundsvegur, Vegurin Langi, Hvítanesvegur og aftur á Eystara Ringveg. Hesin teinur skal koyrast seks ferðir, og málið verður áraka bygningin hjá Elektron.

**Rógvi ikki við**

Rógvi Johansen, ið gjørdist føroyameistari í bæði 100 og 30 km í fjør verður ikki við í ár. Orsøkin er tann, at hann hevur ivaleyst at takast við millum sterkastu súkklararnar í Danmark. Tað gongur alt betri hjá Rógva, og hann hevur í fleiri førum vunnið sær stig í sterkastu donsku røðini.

Einki er at taka seg aftur í, at Rógvi var greiður favorittur, um so var, at hann eisini var við í ár, men hetta hevur so tíverri ikki ligið fyri hjá honum.

Hetta hevur so tað við sær, at spenningurin nú er rættiliga stórur um hvør so verður meistari. Møguleikarnir eru nú fleiri, og skulu vit gita hvør verður meistari í ár so verður tað helst ein dystur millum Jóhann Brend, Kára Brattaberg, Sverra Mohr Edvinsson og Gunnar Dahl-Olsen.

**Eisini fyri tey yngru**

Mansunglingar og kvinnuunglingar kappast eisini um meistaraheitið í ár, men tey koyra ikki 100 km, men 70 km.

Hesi byrja somuleiðis í Skálabotni, og koyra eisini sama tein til Havnar, men fyri teirra viðkomandi endar kappingin, tá tey hava vunnið fram til Havnar.

Annars fer bussur við luttakarum úr Havnini kl. 8.30, og er sjálvandi møguleiki at flyta súkklurnar inn á Skálafjørðin á henda hátt.

Tórshavnar Súkklufelag minnir súkklararnar á, at fyri at sleppa at luttaka er krav at súkklarin bæði hevur hjálm, endurskin og ljós.



# A-landsliðini gera klárt

*Bæði hjá monnum og kvinnum standa stórar avbjóðingar fyri framman hjá A-landsliðnum, og nú nógv verður gjørt til tess at fyrireika seg til komandi kappingarnar*



*Ingi & co. eru nú av álvara farnir undir fyrireikingarnar til komandi landsliðsuppgávurnar*

Handbóltsambandi sendur í komandi viku tvey landslið av landinum at luttaka í eini sterkari kapping í Danmark. A-landsliðini hjá monnum og kvinnum luttaka í Hummel Cup í Aalborg í døgunum 25. — 27. August, har tey koma at møta nøkrum av sterkastu liðum í Danmark, Noreg, og Sveits i innleiðandi umførunum fríggjadagin og leygardagin. Endaumfarið verður leikt sunnudagin 27. August.

Undan hesi kapping verða liðini á eini venjngarlegu í Blendstrup sunnanfyri Aalborg í fýra dagar.

Henda ferð er liður í fyrireikingunum til HM undankappingar dystirnar hjá kvinnum í desember móti Svøríki, og EM undankappingar dystirnar hjá monnum í januar móti Rumenia, Litava og Sveits.

**A-landslið og pressuslið**

Í sambandi við hesa ferð varð ein dystur leiktur í gjár, fríggjakvøldið, kl. 19.45 í Ítróttarhøllini á Hálsi millum A-landsliði hjá monnum og eitt lið ið fjølmiðlarnir saman við Kára Durhuus hava tikið út. Nógvir av spælarunum á pressuliðnum eru ungir og ivaleyst verða teir fastir fúsir á A-landsliðnum komandi árini.

**A-landslið**

Agnar Joensen, VÍF
Áki Olsen, VÍF
Bárður Brimvík, H71
Bárður Nielsen, VÍF
Bjarni Wardum, Kyndil
Hans Áki Dal Christiansen, Kyndil
Heini Joensen, Neistin
Ingi Olsen, VÍF
Jens Skipagøta, Kyndil
Jóhan Danielsen, StÍF
Jónleif Sólsker, Kyndil
Marius Joensen, StÍF
Martin Hummeland, VÍF
Petur Martin Poulsen, KÍF
Sámal Joensen, VÍF
Rúni Poulsen, Kyndil
Vagnur Johannesen, KÍF

Venjari: Palli Joensen
Hjálparvenjari: Daniel Rapa
Liðleiðari: Jákup Durhuus

**Pressulið**

Alexandur Johansen, StÍF
Anfinnur Debess, H71
Arthur Johansen, StÍF
Áki Mørk, Neistin
Eli Müller, VÍF
Eyðun Højgaard, H71
Halgir Dahl Olsen, H71
Haraldur Bjørgvin, VÍF
John Zachariassen, VÍF
Óla Kristian Djurhuus, KÍF
Petur Frank Joensen, VÍF
Petur Martin Johansen, KÍF
Rani Slættanes, Neistin
Sverri Justinussen, Tjaldur
Uni Wardum, Kyndil

Útskiftingarleiðari: Kári O. Durhuus

Sum sagt, so varð dysturin leiktur eftir at blaðið fór til prentingar, men verður meira at hoyra um hetta í týsdagsblaðnum.

# DAEWOO MARATHON CUP

*Fyrsta umfar av samanløgdu marathonkappingini varð runnið norðuri í Klaksvík leygardagin*



*Guttorm Sørensen varð fyrstur um mállingjuna í Klaksvík leygardagin*

Leygardagin 12. august var fyrsta umfar av Daewoo Marathon Cup úti á Bumshamri í Klaksvík. Rutan gekk 4 ferðir niðan eftir Undir Klakki, heimeftir Bumshamarvegi, oman eftir Kelduskákinum og út á endan á Stoksoyravegi har í startur og mál var.

**Úrslit, vaksin:**

**Kvinnur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Rigmor N. Joensen | Bragdið | 20,21 |
| 2. | Brindis Weihe | Bragdið | 26,36 |

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Guttorm Sørensen | Treysti | 16,41 |
| 2. | Signar Røsvig | Bragdið | 16,42 |
| 3. | Sølvi R. Hansen | Roysnið | 18,16 |
| 4. | Cecil Weihe | Bragdið | 18,40 |
| 5. | Bogi Joensen | Treysti | 18,48 |
| 6. | Sigurd Justinussen | Bragdið | 18,52 |
| 7. | Niels Jákup Jakobsen | Bragdið | 18,57 |
| 8. | Flemming Petersen | Gøta | 21,25 |
| 9. | Robert Vilhelmsen | Bragdið | 21,47 |
| 10. | Harry Hansen | Roysnið | 22,35 |
| 11. | Regin Jóanesarson | Vestmanna | 24,08 |

Líkindini at renna vóru ikki av teimum bestu, men tað regnaði tó ikki tað løtuna meðan runnið varð.

Tað luttøku bert tvær kvinnur meðan mennirnir vóru 11 í tali. Teinurin var 5 km og hjá kvinnunum gjørdist Rigmor N. Joensen úr Bragdinum tryggur vinnari við tíðini 20 min. og 21 sek. frammanfyri Brindis Weihe eisini úr Bragdinum í gjørdist nr. 2 við tíðini 26 min. og 36 sek. Hjá monnunum var meira spennandi um fyrsta plássi, tí Guttorm Sørensen og Signar Røsvig fylgdust so at siga allan vegin, og ikki fyrr enn í teimum seinastu 200-300 metrunum slapp Guttorm Sørensen nakrar metrar frammum Signar Røsvig. Guttorm Sørensen vann við tíðini 16 min og 41 sek. meðan nr. 2 gjørdist Signar Røsvig úr Bragdinum við 16 min. og 42 sek. meðan Sølvi R. Hansen úr Roysninum fekk triðjha plássið við tíðini 18 min. og 16 sek.

Nú fyrsta umfar av Daewoo Marathon Cup hevur verið eru tað sostatt 2 kvinnur og 11 menn í hava møguleikan at gjøgnumføra tann samlaða teinin uppá 42 km og 195 metrar og vinna kappingina.

Næsta umfar í Daewoo Marathon Cup verður leygardagin 19. august kl. 13.00 í Havn har runnið verður FM í 1/2-marathon.

Í samband við Daewoo Marathon Cup var eisini skipa fyri renning fyri børn. Tey runnu heimeftir Torvgøtu, oman eftir Kelduskákinum og á mál úti á Stoksoyravegi. Teinurin var 870 metrar ogsíggjast úrslitini aðra staðni á síðuni.

**Væl nøgdir**

Fyrireikarnir úr Treystinum vóru sera væl nøgdir við uppmøtingina hjá børnunum, tí hóast tað hevði regnað sera nógv allan fyrrapartin leygardagin, so vóru tað kortini 35-40 børn í møttu upp til start. Og tey komu bæði av Viðareiði, úr Hvannasundi, Norðdepli, Kunoy, Norðoyri og eisini heilt úr Tórshavn, so ikki kann sigast annað enn, at undirtøkan var góð.

**Úrslit, børn:**

**Gentur undir skúlaaldur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Jórun Klakstein | Klaksvík | 4,15 |
| 2. | Bergfríð Joensen | Klaksvík | 5,16 |
| 3. | Una Joensen | Klaksvík | 5,28 |
| 4. | Elsa Krosstein | Klaksvík | 5,29 |
| 5. | Emma Isaksen | Klaksvík | 5,30 |
| 6. | Rakul Absalonsen | Viðareiði | 5,36 |
| 7. | Gunn Joensen | Klaksvík | 7,14 |

**Dreingir undir skúlaaldur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | John Wiljam Johannesen | Klaksvík | 4.26 |
| 2. | Ásbjørn Vang | Klaksvík | 4.51 |
| 3. | Páll R. Weihe | Bragdið | 4.54 |
| 4. | Alvi Mikkelsen | Klaksvík | 5.21 |
| 5. | Tórur Justesen | Klaksvík | 5.24 |
| 6. | Tummas N. Arge | Bragdið | 6.02 |

**Gentur 1.-3. flokk:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Sára Olsen | Klaksvík | 4,16 |
| 2. | Vilbjørg Johannesen | Klaksvík | 4,52 |
| 3. | Borghild Reyðberg | Kunoy | 4,56 |
| 4. | Erla Vang | Klaksvík | 5,03 |
| 5. | Svanna Eliasen | Klaksvík | 5,34 |

**Dreingir 1.-3. flokk:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Jan Elmar Sørensen | Treysti | 3,35 |
| 2. | Olvheðin Jacobsen | Hvannasund | 3,40 |
| 3. | Bogi Jacobsen | Treysti | 3,40 |
| 4. | Sigmund Olsen | Hvannasund | 3,43 |
| 5. | Absalon Absalonsen | Viðareiði | 3,45 |
| 6. | Steinmund Klakstein | Klaksvík | 4,38 |
| 7. | Jóhan Jacobsen | Hvannasund | 4,38 |

**Gentur 4.-6. flokk:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Helga Djurhus | Tórshavn | 3,10 |
| 2. | Maria í Skorini Jacobsen | Treysti | 3,17 |
| 3. | Rannvá Isaksen | Klaksvík | 4,15 |
| 4. | Jóhanna Reyðberg | Kunoy | |

4,27

**Dreingir 4.-6. flokk:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Álvur F. | Norðdepli | 3,29 |
| 2. | Rasmus Jacobsen | Klaksvík | 3,33 |
| 3. | Ólavur Jacobsen | Treysti | 3,36 |
| 4. | Pætur Rasmussen | Tórshavn | 4,00 |